Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 23.02.2023
Mál nr.: 22/02357
Málsviðgjørt: DH

Fylgiskjal 2

Ummælisskriv

Lógaruppskotið var sent til ummælis hjá Kommunufelagnum, Løgmálaráðnum, Landsbanka Føroya, Gjaldstovuni, felagnum peningastovnum og lagt út á hoyingsportalin.

Inn komu ummælisskriv frá Kommunufelagnum, Landsbanka Føroya og Gjaldstovuni.

Kommunufelagið skrivar í sínum ummælisskrivi, at tey taka fult undir við ætlanini hjá landsstýriskvinnuni at taka afturbering og eftirlønarskatt við í útrokningini av skuldarmarkinum. Víðari heitir kommunufelagið á, at ásetta kommunuskattaprosentið, sum í dag er 23%, verður varðveitt.

Fíggjarmálaráðið er enn ikki komið til nakra niðurstøðu, um hvussu kunngerðin um inntøkugrundarlag skal orðast.

Í mun til skuldarmarkið heldur Landsbankin, at til hetta endamál er tað rætt at kommunur kunnu brúka bæði persónsskattainntøkurnar og flytingar frá landinum við í inntøkugrundarlagið.

Landsbankin hevur har afturat tvær viðmerkingar. Landsbankin vísir á, at býtið av eftirlønarskattinum millum kommunur kundi verið øðrvísi, so at tað í størri mun verður býtt eftir talinum av eldri fólki, ið yvir 80 ár. Landsbankin mælir somuleiðis til at gera lóggávu, sum ger, at landsstýri betri kann stýra og javna út samlaða virksemi í landinum frá ári til ár.

Í tí sambandi er at siga, at Fíggjarmálaráðið fer í næstum at taka upp samband við kommunufelagið, um framtíðar fígging av eldraøkinum og somuleiðis er ætlanin at taka upp arbeiði *við einum fíggjarpolitiskum regluverki, har hetta verður tikið upp.*

Gjaldstovan vísir í sínum skrivi á, at tað ikki er greitt, hvussu nettoskuldin hjá kommununum skal gerast upp.

Hendan viðmerking er tikin til eftirtektar í lógaruppskotinum. Nú stendur í uppskotinum: "...Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkugrundarlagið ***og nettoskuldin*** *skal roknast."*